



Dansarinnan Jóna Thomsen dansaði skuggadans



Magnus Johannesen gandaði á flygli, ljómborðum og harmoniku



Karmarnir í Tivoli vóru teir røttu til hesa frálíku framførslu.



# føroyingum

is og sum heild frálík, so var pallframførslan og samlaða útsjóndin á konsertini munandi minnið imponerandi. Konsertsalurin í Tivoli leggur upp til galla veitslu. Eivør var veitsluskrýdd í einum fantastiskum kjóla í hvørjari hálvu av konsertini. Eisini tær báðar góðu kórsongkvinnurnar tyktust í sínum tænarauniformi rættiliga gjøgnumførdar, tað sama kann sigast um strúkarakvartettina, ið øll var í myrkum klæðum. Men restin av tónleikarunum sóu út, sum um teir vóru farnir í tað fyrsta og besta plaggið, ið rakst við seingjarstólpan leygarmorgunin. Hetta fekk pallmyndina at síggja enn meira óruddiliga út. Frammanundan vóru so nógv ljóðføri uppstillaði, at pallurin líktist einum loppimarknaði. Tað átti ikki at verið so trupult, at biðið fólkið latið seg í t.d. svart til hesa konsertina, nú karmarnir vóru, sum teir vóru.

## Skuggadansur og reyðar gamasjubuksur

Eitt sindur av pallframførslu var eisini, nevniliga skuggadansur við Jónu Thomsen. Men hetta riggaði satt at siga illa. Ein hvítur bannari datt úr loftinum úti við høgru síðu á pallinum, ein ljóskastari lýsti aftanfyri soleiðis, at skuggarnir av dansinum vórðu kastaðir upp á bannaran. Jóna dugur væl, og hennara partur lá ikki eftir. Men hetta var alt annað enn væl fyriskipað.

Serliga var tann eina løtan pínlig. Jóna dansaði skuggadans við tveimum viftum aftanfyri bannaran, men glopp var millum bannaran og leiktjaldið, so reyvin á Jónu í reyðum gamasjubuksum stakk útundan bannaranum væl upplýst av ljóskastaranum. Upplivingin misti mest sum eitt sindur av eleganssuni.

Seinni dansaði Jóna sum ein álvagenta yvirum pallin, men óruddaliga pallmyndin tók so mikið frá dansinum, at hetta var alt annað enn væleydnað. T.d. sást dansurin ikki tí einu løtuna, tí dansarinnan hvarv aftur undir eina stórtrummu. Eina aðra løtu dansaði Jóna aftan fyri bannarin, uttan at tað sást úr salinum. Tað var eitt sindur synd fyri heildarupplivingina, at showið ikki var betur lagt til rættis, serliga tá lagt er upp til okkurt heilt stórt, nú Eivør vitjaði hetta stórsligna konsertstað. Men samstundis var konsertin tónlistarliga somikið góð, at áskoðararnir uttan at blunka fyrigeva Eivør fyri showið.



Eivør hevur veruliga ment seg seinastu tíðina